# Nótaflotin kemur í klemmu av nývali




**SAMGONGUKREPPA** Um val verður útskrivað nú, kann allur nótaflotin og partvís heimaflotin verða raktur. - Øll prosessin at útskriva makrelloyvi kemur draga út, og tá verður eingin kunngerð lýst enn á sinni, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður

Vilmund Jacobsen

Nú samgongan eftir øllum at døma hevur rent seg í stórar brotasjógvar, tí semja ikki er um játtanarkarmin fyri komandi fíggjarár, hevur formaðurin í Fólkaflokkinum, Jørgen Niclasen, biðið



*- Alt annað líka koma tey skip, sum njóta gott at eini vónandi góðari makrelveiði í ár, at rinda skatt eftir samtyktini á løgtingi um skatting av serligum yvirskoti í 2011, sigur Jacob Vestergaard*

løgmann umhugsað at skriva út nýval.

- Vit hava heitt á løgmann um at umhugsa at útskriva nýval. Valstríð er komið í fíggjarpolitikkin, og tað førir til ovurnýtslu, og tá er best at reinsa luftina, helt Jørgen Niclasen, fyri í Degi og Viku í gjárkvøldið.

Løgmaður, Kaj Leo Johannesen, heldur seg hava fingið eitt ógreitt svar frá Fólkaflokkinum um, hvørt flokkurin er við í samgonguni ella ikki.

Sum skilst, fer løgmaður at hava fund við Jørgen Niclasen, formann Fólkaflokksins og Aksel V. Johannesen, fíggjarmálaráðharra, í dag.

## Stýgur kemur í

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, hevur ikki hug at blanda seg upp í flokspolitiska arbeiði hjá Jørgeni Niclasen, sum hann annars sigur seg taka fult undir við. Men hann sær fyri sær, at endar hetta við so stórari samgongukreppu, at løgmaður fer at útskriva val, kann hetta føra til, at fiskiflotin ikki sleppur á makrelveiði enn á sinni.

- Eg havi skilt, at nótaskipini, sum lítlan og ongan svartkjaft hava at fiska, bíða eftir kunnugerðini um makrelveiði. Nú vita vit ikki við vissu, hvussu nógvur makrelur er í føroyskum sjógvi í løtuni, tí tað enn so tíðliga upp á árið, og skip hava ikki verið og leitað. Men vit vita, at makrelur er longu í føroyskum sjógvi, tó at vit vita ikki, hvussu stórar nøgdirnar eru enn.

Jacob Vestergaard sigur, at kunngerðin, sum skal áseta føroysku eginkvotuna og býta tilfeingið millum skipabólkarar, helst verður klár at senda Fiskivinnuráðnum til ummælis í dag ella mánadagin.

- Men um val verður útskrivað, kann øll prosessin draga út, og tá verður eingin kunngerð lýst enn á sinni – og uttan kunngerð sleppa skipini ikki til fiskiskap, sigur hann.

## Saklig ósemja

Vit loyvdu okkum at spyrja Jacob Vestergaard, hvussu djúpt ósemjan millum Fólkaflokkin og hinar samgonguflokkarnar stingur, nú tosað verður um nýval.

- Í dagar og vikur hava vit tosa skilagott saman um viðurskiftini rundan um ein fíggjarligan leist og játtanarkarmin, og vit hava sakliga gjørt støðuna greiða yvirfyri hvørjum øðrum, men vit eru ikki samdir.

Hann heldur, at allir partar – hvør í sínum lagi - hava roynt at givið seg, men ásannar samstundis, at semja var ikki um játtanarkarmin, tá fíggjarmálaráðharrin, Aksel V. Johannesen, bar uppskotið niðan í løgtingið.

Tað eru ymisk viðurskifti í játtanarkarminum, sum Fólkaflokkurin ikki tekur undir við, og millum hesi er, at inntøkur frá sølu av fiskirættindum skulu geva 40 miljónir krónur í komandi fíggjarári.

Hetta líkar ikki Jacobi Vestergaard, sum vísir á, at longu í fíggjarlógini fyri 2011 er ein eykaskattur – ella eitt tilfeingisgjald – álagt hvørji miljón, sum ali-og fiskivinnan hava í avlopi.

- Hetta samtykti løgtingið fyri nýggjár og er galdandi fyri fíggjarárið, sum vit eru í, leggur landsstýrismaðurin aftrat.

Hann vísir á, at hetta er tað, sum samgongan hevur samtykt skal vera galdandi, meðan roynt verður at finna fram til eina varandi skipan á økinum.

- Vit halda tað ikki vera rætt í óðum verkum at fara at áleggja vinnuni enn størri gjøld.

## Ymiskar meiningar

Jacob Vestergaard vísir til bólkar, sum hava sitið og arbeitt við hesum máli og sigur, at niðurstøðurnar av arbeiðnum hjá bólkinum, sum hann setti kunnu lesast á heimasíðuni hjá Fiskimálaráðnum.

- Bólkarnir arbeiddu við spurninginum, hvussu teir sóu eitt tilfeingisgjald, og her vísti bólkurin, sum Fiskimálaráðið setti, á, at til ber at skatta serligt avlop – og ein annar máti var at bjóða kvotur út.

Landsstýrismaðurin heldur, at søla av fiskirættindum er ikki nakað, sum eigur at fremjast soleiðis eftir fummum, men má viðgerast bæði væl og virðiliga, um hetta yvirhøvur kann koma upp á tal.

- Eg haldi tað tí vera heilt burtur við at seta 40 miljónir krónur á inntøkusíðuna fyri 2012 vísandi til sølu av fiskirættindum. Hetta kunnu vit í Fólkaflokkinum ikki standa modell til, samstundis sum almenni raksturin av samfelagnum verður øktur, sum hann málber seg.

Hann heldur tað eisini hanga í alt ov leysum lofti, sum fíggjarmálaráðharrin skjýtir upp til tess at røkka hesum 40 miljónunum fyri fiskirættindi í 2012.

- Alt annað líka koma tey skip, sum njóta gott at eini vónandi góðari makrelveiði í ár, at rinda skatt eftir samtyktini á løgtingi um skatting av serligum yvirskoti í 2011. Okkum líkar ikki, at samgongan soleiðis upp á kvamsvís fer at uppfinna eitt nummar tvey – á inntøkusíðuni og soleiðis eisini á útreiðslusíðuni hjá vinnuni, sum landsstýrismaðurin tekur til.

## Ikki blanda seg

Í einum trúnaðarskjali, sum uttanlandsnevndin sendi Jacobi Vestergaard fyrr í ár, mælir ein stórur meiriluti í nevndini til, at umleið 60.000 tons av føroysku eginkvotuni av markreli í ár verður lutað Havstovuni til royndir og annars verður seld hægstbjóðandi.

- Uttanlandsnevndin er sjálvandi vælkomin við tilmælum um, hvussu Føroyar skulu takla hesi viðurskifti mótvegis teimum, vit standa yvirfyri.

Hann helt, at sjálvandi eigur nevndin at hava sínar meiningar um, hvørji føroysku sjónarmiðini mótvegis hinum tjóðunum eiga at verða, og hon eigur soleiðis eisini at hava sínar meiningar um vísundaligar kanningar.

- Men, hvussu ávísa býti her heima fer fram, haldi eg persónliga liggur uttanfyri virkisøkið hjá uttanlandsnevndini, segði Jacob Vestergaard tá við Sosialin.

*vilmund@sosialurin.fo*